MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Dagur:** 13. februar 2006
**Skrátal:** 70-51301
**Máltal:** 060125 -/4

# Rundskriv
# um
# studning til fólka- og skúlabókasøvn

Víst verður til løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005.

Sambært § 14, stk. 1 og 2 í lógini rindar landið fólkabókasøvnunum studning til rakstur, og verður árliga studningsprosentið roknað í mun til játtaðu upphæddina á løgtingsfíggjarlógini, tó í mesta lagi 40% av góðkendari fíggjarætlan.

Sambært § 19 í lógini rindar landið skúlabókasøvnunum 60 % í studningi til útreiðslur av undirvísingartilfari og –amboðum, og verður stuðulin avroknaður samsvarandi endaliga roknskapinum fyri undanfarna fíggjarár.

**1. Umbøn um studning**
Á hvørjum ári **í seinasta lagi 15. mai** skal Landsbókasavnið hava móttikið umsóknir frá fólka- og skúlabókasøvnunum um studning komandi fíggjarár. Við umsóknini skal fylgja ein fíggjarætlan fyri komandi fíggjarár.

Útrokningargrundarlag fyri fólkabókasøvn eru útreiðslur til:

- Løn til starvsfólk
- Bókasavnstilfar
- Hiti, ljós og reingerð
- Telduútgerð, innbúgv og viðlíkahald

Útrokningargrundarlag fyri skúlabókasøvn eru útreiðslur til:

- Undirvísingartilfar
- Undirvísingaramboð

**2. Fráboðan um studning**
Vanliga verður uppskot til fíggjarløgtingslóg lagt fyri tingið 1. oktober á hvørjum ári. Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg stendur samlaða studningsjáttanin til fólka- og skúla-bókasøvn. Út frá uppskotinum til játtan boðar Landsbókasavnið í oktober á hvørjum ári hvørjum einstøkum fólka- og skúlabókasavni frá, hvussu nógvur studningur kann væntast, at verða veittur teimum komandi fíggjarár. Henda fráboðan verður givin við tí fyrivarni, at samlaða uppskotið til studningsjáttan til fólka- og skúlabókasøvn verður samtykt á endaligu fíggjarløgtingslógini fyri komandi ár.

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Tá ið uppskotið til fíggjarløgtingslóg er samtykt í tinginum, vanliga í november/ december, boðar Landsbókasavnið fólka- og skúlabókasøvnunum frá endaligu studningsupphæddini.

**3. Rindan av studningi**
Í februar/mars mánaða rindar Landsbókasavnið teimum einstøku fólka- og skúlabókasøvnunum 80 % av játtaða studninginum fyri hetta fíggjarárið.
Tá fíggjarárið er av og **í seinasta lagi 31. januar árið eftir,** skulu fólka- og skúlabókasøvnini senda Landsbókasavninum roknskapin fyri farna fíggjarárið. Í februar avroknar Landsbókasavnið so tað, sum er eftir av játtaða studninginum fyri undanfarna rakstrarár út frá innsenda roknskapinum, tó í mesta lagi 40% ella 60% av góðkendu fíggjarætlanini fyri tað árið, alt eftir um talan er um fólka- ella skúlabókasøvn.

**4. Gildiskoma**
Hetta rundskriv kemur í gildi tann 13. februar 2006, og samstundis verður rundskriv frá 14. mars 2002 um studning til fólka- og skúlabókasøvn sett úr gildi.

Tórshavn tann 13. februar 2006,

Jógvan á Lakjuni
landsstýrismaður

/ Petur Petersen, aðalstjóri